

# VIRKIN OKTOBER 2022
# BØRN

| MÁNADAGUR | TÝSDAGUR | MIKUDAGUR | HÓSDAGUR | FRÍGGJADAGUR | LEYGARDAGUR | SUNNUDAGUR |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *ABC vika | | | | | 1 Spyr mammu ella babba um at gera eitt hugnakvøld og spælið eitt borðspæl | 2 Lær onkran okkurt, sum tú dugir væl. T.d. at dansa, eitt spæl ella eina gátu |
| 3 Ver saman við einum vini, sum tað er langt síðan, tú hevur sæð | 4 Vitja ommu, abba, langommu, langabba, ella onkran annan eldri | 5 Ger okkurt í dag, sum ger teg ordiliga glaða/n | 6 Lær teg okkurt nýtt. Spyr ein vaksnan um okkurt, sum tú vilt vita meira um | 7 Steðga á, smíl og sig hey við tey, tú møtir | 8 Ver kropsliga virkin! Statt á rennifjøl, spæl krógva og blunda ella fótbólt | 9 Far í sunnudagsskúla, á møti ella út í náttúruna og anda djúpt niður í búkin |
| 10 Spyr onkran, um tú kanst sleppa at síggja og hjálpa onkrum at fletta, ella lær teg um føroyska mentan | 11 Hjálp teimum vaksnu við at gera nátturða ella at gera reint | 12 Hygg nógv minni í skíggja í dag. Kanska slett ikki og vita, hvat tú finnur uppá | 13 Vitja eitt savn og lær um list, mentan ella søgu | 14 Far ein túr við onkrum og tak ruskið upp, sum tú sært á vegnum | 15 Lær teg okkurt nýtt. Kasta ein bólt, 7 tabellina, ella at binda lissur | 16 Ger okkurt, sum tú heldur er ordiliga stuttligt |
| 17 Bið familju ella vinir koma út at gera okkurt saman við tær | 18 Byrja ella enda dagin við at strekkja kroppin | 19 Far út og spæl, ella gakk í skúla | 20 Les eina bók ella eitt blað, ella bið onkran lesa fyri tær | 21 Sig trý góð orð um teg sjálva/n | 22 Gleð foreldrini ella ommu og abba við onkrum, sum tú hevur bakað ella teknað | 23 Ver kreativ/ur! Tekna, mála ella klipp og líma |
| 24 Ger okkurt, sum tú altíð hevur droymt um. Tær nýtist ikki at vera heimsmeistari | 25 Gakk, súkkla ella far ein túr vid rennihjólinum | 26 Gleð ein vin! Sig nøkur góð orð, ella skriva ella tekna eina lítla heilsan | 27 Ver sálarliga virkin! Legg putlispæl, lær teg at telva ella spæla kort | 28 Finn uppá okkurt, sum fleiri kunnu spæla saman í fríkorterinum ella úti í garðinum í dag | 29 Ger eina spurnakapping ella hygg at einum filmi saman við familju ella vinum | 30 Syng og dansa til tín yndis tónleik |
| 31 Hugsa um, hvat ger teg glaða/n, sum tú vilt halda fram at gera | | | | | | |

Vit fáa tað gott, tá vit eru virkin, saman við øðrum og hugbundin í onkrum, sum okkum dámar sera væl.
Vit verða glað, tá vit gera okkurt gott fyri onnur og gera okkurt, sum vit halda er stuttligt.
So ver virkin bæði saman við øðrum og fyri teg sjálva/n uppá nógvar ymiskar mátar í oktober.

A Ver virkin  S Ver saman  C Ver hugbundin

ABC FYRI SÁLARLIGA HEILSU — Ver virkin Ver saman Ver hugbundin

Fólkaheilsuráðið

